# ngar ikki tey ungu






*Marianna og Rannvá vilja gera upp við siðbundnu listina í Føroyum, og vísa á óendaligu møguleikarnar, ið eru innan list*

*Myndir: Jens Kr. Vang*

ætlaður ungum fólki, ið vísir hvussu hugskotini til filmarnar um dukkurnar og um framsýningina sum heild, eru komin, sigur Rannvá, og heldur fram, – List er ofta nakað mystiskt og duldarfult. Men við dokumentarfilminum kunnu fólk síggja júst hvussu vit hava arbeitt, hvussu hugskotini eru komin, og so víðari. Vit vildu gera listina minni duldarfulla.

– Eitt av endamálunum var eisini at nýta rúmd og vídd á ein ótraditionellan hátt. Vit vilja ikki hava eina framsýning, har fólk koma inn í eitt tómt, hvítt rúm, har málningarnir hanga á vegginum, við eini ávísari frástøðu. Vit vilja skapa eina atmosferu, soleiðis, at tey, sum koma at hyggja eisini gerast ein partur av framsýningini, heldur enn at tey hava eina stóra distancu til listina, greiðir Marianna frá.

Sum skilst, verður stílurin gamaldags og slitin. Retro møblar verða settir inn í Smiðjuna, so fólk kunnu seta seg niður og taka tað róligt. Filmarnir eru »aged«, t.v.s. gjørdir slitnir á at líta við vilja. Ætlanin er, at genbrugatmosferan skal vera eitt berandi element á framsýningini.

– Vit vóna veruliga seta nakrar tankar í gongd hjá fólki um hvat lost í veruleikanum er. Hetta er ótraditionelt, við gomlum klæðum og møblum, blandað saman við nýggjastu tøknini, og livandi myndlist. Hetta er so okkara máti at gera tað uppá, og fólki nýtist ikki at dáma tað, fyri at tað kann hava eina ávirkan á tey, og fáa tey at hugsa í nýggjum banum, sigur Rannvá.

Framsýningin »Dukkumentar« hevur opið frá fríggjadegnum 7. januar til týsdagin 11. januar.

– Øll eru sjálvsagt vælkomin, men vit miðja kanska serliga ímóti at fáa tey 20-25 ára gomlu at hyggja, siga ungu, slóðbrótandi listakvinnurnar at enda.






